FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 19. nov. 2021
J. nr.: 21/20792
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning 52-054/2021 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Hestleiðina og ætlanirnar eftir at Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu metir landsstýrismaðurin tænastuna vera á Hestleiðini í løtuni, og hvussu grundgevur hann fyri teimum skerjingum, ið eru gjørdar seinastu árini?

2. Hví møtti landsstýrismaðurin ikki á fundi hjá Útoyggjafelagnum um støðuna og framtíðina á Hestleiðini?

3. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at betra tænastuna á Hestleiðini og at samskifta við fólkið í Hesti um tørv og møguleikar?

4. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin fyri Hestleiðina eftir at Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu?

Svar til spurning nr. 1
Tað er sera umráðandi, at hóskandi ferðasamband er kring alt landið. Eitt gott samferðslukervi hevur alstóran týdning fyri trivnað og menning.

Tað búgva 18 fólk í Hesti. Strandferðslan metir, at fastbúgvandi í Hesti, sum heild eru nøgd við ferðaætlanina.

Eftir ferðaætlanini í ár (2021) siglir Teistin 18 ferðir um vikuna (tur/retur) beinleiðis millum Gomlurætt og Hest. Hetta er sama túratal sum í 2016, 2017 og 2018. Tilkalling er til allar túrar. Í 2019 og 2020 sigldi Spógvin eisini millum Gomlurætt og Hest samanlagt 24 túrar, umframt at Teistin sigldi millum Skopun, Hest og Gomlurætt 5 ferðir um vikuna. Hóast hetta, so lækkaði ferðafólkatalið frá 2018 til 2019.

Funnist hevur verið at, at tað ikki ber til at pendla millum Hest og miðstaðarøkið, serliga tí fyrsti túrur frá Hesti ikki hevur verið nóg tíðliga. Talið av ferðandi á morguntúrinum á Hestsleiðini hevur verið sera lítið. Ja, ferðafólkatalið var 0,2 í miðal fyrsta túrin hjá Spógvanum kl. 07.00, tá hann varð settur í fasta sigling og síðan 1-2 ferðafólk, tá farið var aftur til tilkalling til túrin hjá Teistanum kl.7.20. Hetta er ein orsøk til at farið var aftur til gomlu ferðaætlanina.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Svar til spurning 2
Útoyggjafelagið og hestfólk ætla at skipa fyri einum tiltakið um samferðslu í Hesti hin 26. novembur í ár.

Svar til spurning 3 og 4
Um so er, at ferðaætlanin verður víðkað, eigur atlit at takast til, at Teistin røkir tvær farleiðir. Strandferðslan vísir á møguleikan fyri, at Erla Kongsdóttir siglir nakrar túrar á Hestsleiðini um vikuna; til dømis túrin úr Hesti kl. 7.20 sum eina royndarverkætlan.

Landsstýrismaðurin fylgir við gongdini í Hesti og er til reiðar at taka málið upp um møguliga broytta ferðaætlan, um fyritreytirnar broytast.

Eftir ætlan letur Sandoyartunnilin upp fyri ferðslu í desembur 2023, og skal tá verða funnin ein haldgóð loysn á, hvussu farleiðin skal skipast. Landsstýrismaðurin vil tryggja, at ferðasambandið á Hestsleiðini er gott.

Tinganes, 19. oktobur 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum